ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.



# Hús í Klaksvík

Sethúsaognin matr. nr. 55 og 56, Klaksvík, Stoksoyrarvegur 65, verður seld, um hóskandi boð fæst.

Grundøkini eru til støddar 251 m2 tilsamans. Eldri parturin av húsunum er bygdur uml. 1940 og nýggjari parturin uml. 1950. Í 1987 vórðu húsini umvæld. Tey vórðu bjálvað, klødd við timbri, tak og vindeygu skift. Húsini kunnu nýtast sum tvær sjálvstøðugar íbúðir, ella sum ein eind.

Húsini eru innrættað soleiðis:

**Eldri parturin:**
Miðhædd: Gangur, stova og køkur.
Á loftinum: Lítið kamar, størri kamar, kvistur, baðirúm og úti á lofti.

**Nýggjari parturin:**
Miðhædd: Gangur, køkur og stova.
Loft: 3 kømur og baðiverilsi.

Úthús við kjallara og hjalli standa á stykkinum.

Nærri upplýsingar um ognina fáast við at venda sær til Fríðu Patursson, advokat, telefon 353335 ella t-post frp@jura.fo og skrivaran Maibritt Johannessen t-post maj@jura.fo

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Jens Andrias Vinther, adv.
Aksel V. Johannesen, adv.



# Jørð í Norðragøtu

Um hóskandi boð fæst, verða hesar ognir lýstar til sølu:

Matr. nr. 2 , Norðragøta, sum er 5 gl. og 14 sk. í hagapartinum Yviri á Dal og 14.178 m$^2$ innangarðs í trimum lutum, og matr. nr. 94 a, sum er 1 gl. 10 sk. og innangarðs 2.870 m$^2$ við ástandandi seyðahúsi. Meginparturin av innagarðsjørðini, umleið 14.000 m$^2$, liggur við veg inni í Dalinum, og høgligt er at koma til jørðina og seyðahúsið. Tveir smærri lutir liggja í vinnuøki við Gøtugjógv.

***Nærri upplýsingar fáast frá***

**Advokatskrivstovuni**
Frúutrøð 4 · Postboks 6 · 110 Tórshavn
**Tel. 35 33 35**
Fríða Patursson, adv. (frp@jura.fo ella
Bjørg á Rógvi, skr. (bar@jura.fo)

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

Drotning Margrethu 1957 KFUM & K Barnagarður

## Dr. Margrethu Barnagarður
# søkir HÚSAVØRÐ

Søkt verður eftir húsavørði 20 tímar um vikuna at byrja 1.januar 2007 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiði fevnir um viðlíkahald og ábøtur av bygningi innan og uttandura og annað fyrifallandi arbeiði. Haraftrat nýgerð og umbyggingar á stovninum

**Vit vanta at tú ert:**
- Frísk / ur og hevur eitt lætt sinnalag.
- Kreativ / ur kann arbeiða sjálvstøðug / ur.
- Aldur, allar umsóknir vælkomnar
- Hevur góð handalig evnir
- Góð samstarvsevnir

Setunarviðurskifti verða við viðkomandi yrkisfelag og Dr. Margrethu Barnagarður.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

Vit vænta, at tú saman við okkum skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Umsóknir saman við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 19.decembur 2007, kl.12.00.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran á tlf. 455557 lokal 10.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
**Gerðagøta**
**FO-700 Klaksvík.**

Tvøroyrar Kommuna

# Frá Tvøroyrar Havn

Heitt verður á fólk, sum eiga bátavognar, bátavrak o.a. sum misprýðir, um at fáa hetta burtur av økinum við báðar bátahyljarnar. Eisini skulu øll avmerkt parkeringspláss haldast frí fyri óruddi. Eftir 17. desembur verður tað sum liggur eftir burturbeint fyri eigarans rokning.

**Havnameistarin**

FØROYA HANDILSSKÚLI

# VASKIFÓLK
## til Føroya Handilsskúla á Kambsdali

Søkt verður eftir vaskifólki 15 tímar um vikuna at byrja 3. januar 2008. Vaskað verður í tíðarbilinum kl. 15.30 til kl. 18.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Dia Petersen, húsavørð á tel. 220901.

Løn sambært sáttmála hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Skrivlig umsókn skal verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 17. desember 2007.

**Føroya Handilsskúli**
Kambsdalur | FO-530 Fuglafjørður
Tel + 298 444900 | Fax + 298 444901
fhk@skulin.fo

fk

# Matseðilin

*Fríggjadagin 7. desember*
**Saltkjøt v/ertrum / Fiskafrikadellur**

*Leygardagin 8. desember*
**Hunangsglaserað skinka**

*Mánadagin 10. desember*
**Stoktur fiskur / Royktur medistari**

*Týsdagin 11. desember*
**Krebinettir / Grýturættur (neytakjøt)**

*Mikudagin 12. desember*
**Stoktur høsnarungi / Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**